# 60-70 bátsmanningar á festivali



*Formaðurin í Bátafelagnum á Toftum, Høgni W. Høgnesen, er fremstur á bryggjuni, tá bátafylgið nærkast*

**Líkindini vóru av teimum bestu, tá bátafylgið stevndi inn í Oyrarnar á Toftum beint fyri klokkan 15 seinnapartin leygardagin**

BÁTAFESTIVALUR
*Orð/myndir:*
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hetta er fjórða árið á rað, at Bátafelagið í Nes kommunu skipar fyri bátafestivali, og hetta er samstundis fyrsta bátastevnan av sínum slag á árinum.

Í byrjanini av síðstu viku søgdu veðurmenninir heldur vánaligt veður við regni og frískum vindi til leygardagin. Men so hvørt, sum vikan leið, og leygardagurin nærkaðist, gjørdust útlitini betri – við minni vindi og turrari veðri.

Bátarnir, sum tóku lut í festivalinum, møttust í Skálafirði leygardagin klokkan 12.30, og tá klokkan nærkaðist 15, la bátafylgið úti fyri Oyrunum á Toftum, har teir – ein og ein - stevndu inn í Oyrahavnina.

Talið av bátum var millum 60 og 70, og hetta er umleið sama tal, sum á festivalinum í fjør.

Fremstir á bryggjuni at taka ímóti bátsmanningunum, vóru formaðurin í Bátafelagnum, Høgni W. Høgnesen og nýggi havnameistarin í Nes kommunu, Hans Óli Viberg, sum byrjaði í nýggja starvinum, 28. apríl.

Tá bátarnir høvdu lagt til bryggju, hoyrdust harmonikutónar ljóma aftur við kendum sjómansvísum og øðrum sangum, ið fólk hava tikið til sín.

Hetta setti sín serstaka dám á móttøkuna.

Bátafelagið bjóðaði síðan øllum manningunum út í matstovuna á virkinum hjá Faroe Seafood til heita suppu og okkurt leskandi.

Bátafestivalurin byrjaði í besta veðri – við turrveðri, lítlum og ongum loti og fitt av sól.

Tað var ikki fyrr enn seinni um kvøldið, at regnið, sum veðurmenninir høvdu spátt, kom.

Millum tiltøkini, sum annars hava við sjógvin at gera, var framsýning í húsunum hjá Fíu á Rætt í sambandi við, at róðrar-og seglbáturin Dvørgamoy hevur 10 ár á baki seinni í hesum mánaðinum.

Dvørgamoy var eisini millum bátarnar, sum tóku ímóti bátafylginum úr Skálafirði.

Umstøðurnar í rúmligu Oyrahavnini at taka ímóti bátum eru góðar við landstreymi og vatni.

Bátafelagið á Toftum skipaði fyri nógvum ymiskum tiltøkum, bæði til gamans og álvara, allan leygardagin og leygarkvøldið.

Út á leygarkvøldið og sunnunáttina varð góður dansur í nýggja tjaldinum, sum Bátafelagið hevur keypt.



*Einir 60-70 bátar vóru við á bátafestivalinum á Toftum leygardagin, og tað er umleið sama tal sum í fjør*



*Nýggi havnameistarin, Hans Óli Viberg, skipar fyri, hvussu bátarnir skulu liggja í havnini*

# 500 tons av alitoski klárir til sláturs

**- Partapeningurin hjá okkum er 50 miljónir krónur, og tí hava vit ongan akuttan tørv á at taka fiskin beint nú, sigur dagligi leiðarin hjá Termar Sea Farm, Kjell Dahl**

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í heyst ella í vetur hevur felagið Termar Sea Farm í Herøy í Noregi eini 500 tons av aldum toski, sum kunnu takast og seljast.

Tað er Helgelands Blad, sum ber tíðindini.

Fiskurin, sum verður tikin í heyst ella í vetur, er hin fyrsti hjá felagnum, síðan Termer Sea Farm yvirtók virksemið hjá øðrum felag.

Termer hevur gjørt stórar íløgur í virksemið við toskaaling. Eitt nú hevur felagið latið smíða ein nýggjan fóðurbát, sum kostaði sjey miljónir krónur og hevur eisini gjørt stórar íløgur í nótir og annan útbúnað.

- Partapeningurin hjá okkum er 50 miljónir krónur, so vit hava tí ongan akuttan tørv á at taka fiskin beint nú, sigur dagligi leiðarin, Kjell Dahl, við blaðið.

Termar hevur eina 3-ára avtalu við Codfarmers, sum eitt nú byggir á, at Termar skal framleiða og selja Codfarmers 10,5 miljónir toskar til útseting í trý ár.

Í løtuni hevur Termar Sea Farm umleið 2 miljónir toskayngul svimjandi í nótum, og av hesum skulu umleið 1,8 miljónir fiskar seljast víðari til aðrar alarar.



*Termer Sea Farm í Noregi hevur gjørt stórar íløgur í toskaaling*